Epileptikarafelag Føroya:

# Vertur fyri norðurlendskum epilepsifundi

**Um vikuskiftið verður norðurlendskur epilepsifundur í Føroyum. Tað er Epileptikarafelag Føroya, sum er vertur fyri fundinum, ið er fyri øll Norðurlondini. Endamálið við fundinum er at samskipa vitan o. a. um epilepsi landanna millum**

EPILEPSI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er vorðin siðvenja, at norðurlondini hittast á hendan hátt, har epilepsifeløgini upp á skift eru vertir. Tað er sjálvandi ein stór uppgáva fyri eitt lítið felag, sum tað føroyska, har alt virksemið er bygt á sjálvboðið arbeiðið.

Randfríð Sørensen, forkvinna í Epileptikarafelag Føroya, sigur, at tað er av stórum týdningi at vit læra hvør av øðrum á hendan hátt, tí trupulleikarnir eru teir somu í øllum Norðurlondunum.

– Á henda hátt geva vit eisini epilepsi ans, og tað hjálpir okkum, tá vit skulu virka fyri at betra um viðgerðarmøguleikarnar, so lívstreytirnar hjá fólki við epilepsi verða bøttar, eitt nú við skúlagongd, útbúgving og arbeiði, sigur Randfríð Sørensen.

Fyri Epileptikarafelag Føroya hevur tað eisini týdning at skapa opinleika. Hetta verður m. a. gjørt við at halda kunningarfundir, bæði fyri ung við epilepsi og við at læknar koma uttanifrá at halda fyrilestrar. Fyrst í juni verður ein slíkur fyrilestur aftur, har Bjarki á Rógvi Hansen og Ellids Kristensen frá Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn fara at greiða frá um epilepsi og kynslív og um varandi brek og kynslív.

– Epileptikarafelagið í Danmark gevur eitt blað út og kunningartilfar, og hesum hava vit fragd av, sigur Randfríð Sørensen.

Á slíkum norðurlendskum fundum er fastur táttur, at feløgini kunna hvørt annað, bæði við góðum og ringum royndum.

– Men at útvega pening er altíð trupult. Hetta er eitt stríð, vit øll stríðast. Tí verður eisini tosað um »fondraising« – at søkja pengar úr grunnum o. l. – á fundinum, har vit kunnu læra nógv av hvør øðrum, sigur Randfríð Sørensen.



*– Okkara uppgáva er at virka fyri at viðgerðarmøguleikarnir hjá epileptikarum verða bøttir, so lívstreytirnar hjá fólki við epilepsi verða bøttar, sigur Randfríð Sørensen, forkvinna í Epileptikarafelag Føroya*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Nýggjur flokkur til býráðsvalið í Havn

**Tá ið borgarar í Tórshavnar Kommunu fara á býráðsval í heyst, verður ein nýggjur flokkur afturat teimum verandi flokkunum**

BÝRÁÐSVAL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað hevur leingi ljóðað millum fólk í høvuðsstaðnum, at ein nýggjur borgaraflokkur verður stovnaður til býráðsvalið íheyst, og nú eru tíðindini so váttaði.

### Havnarflokkurin

Tann nýggi flokkurin kemur at eita Havnarflokkurin, siga stigtakararnir av flokkinum. Í einum tíðindaskrivi, sum er sent fjølmiðlunum, verður sagt, at endamálið hjá flokkinum er at skapa trivnað í høvuðsstaðnum, og at hetta bert verður veruleiki, um vit hava eitt virkið framleiðsluskapandi vinnulív í Havn.

Flokkurin, ið kemur at verða politiskt óheftur, fer eisini at leggja dent á onnur mál, so sum áhugamálini hjá teimum eldru, ferðavinnu, handilslívið í høvuðsstaðnum, eina marinu í Vágsbotn og eisini eitt virkið tónleika- og mentanarlív við góðum karmum til sítt virksemi. Í sambandi við stovnanina av flokkinum, eru miðlarnir bjóðaðir á tíðindafund fríggjamorgunin, har nærri verður greitt frá ætlanum flokksins.

## Tríggjar nýggjar barnabøkur

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tríggjar bøkur, smábarnabókina *Djóragarðurin hjá Villa* eftir Yves Got, barnabókina *Gula ballónin* eftir Charlotte Demantos, og bókina til størri børn *Úlvanátt í Berardenga* eftir Bjørn Sortland**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*




Í Djóragarðinum hjá Villa eru 100 fittar og stuttligar myndir, sum Yves Got hevur teknað til allarminstu kúllarnar og gellurnar. Strutsur, nísa, kanariufuglur, krokodilla og onnur forkunnug djór. Í djóragarðinum hjá Villa eru dýrini bleyt sum toydýr – og stuttlig sum leika.

Rakel Helmsdal týddi úr fronskum. Bókin, sum er væl egnað til tey 0 til 2 ára gomlu, er 110 síður í litum, innbundin og polstrað, og kostar kr. 95 í bókabúðunum.

Gula ballónin ferðast yvir dalar og fjøll. Í bókini er eingin tekstur, so í fyrstu atløgu halda vit kanska, at eingin søga er, men barnsliga hugflogið sær skjótt søgugongdina í býnum, í oyðimørkini, á havinum, í frumskóginum – og allar myndirnar hava okkurt í felag. Á hvørjari opnu er ein lítil, bláur bilur, ein fakirur á einum flúgvandi teppi, ein bandittur í fangaklæðum og ein gul ballón. Og hyggur tú serliga væl, sært tú kanska Pippi, jólamannin og onnur.

Bókin, sum er væl egnað til tey 3-7 ára gomlu, er 30 síður, innbundin og kostar k. 95 í bókabúðunum.

Úlvanátt í Berardenga er onnur bókin í røðini um Juliu og Jónas. Fyrsta bókin var Dýrgripur Tu Ducts, sum kom út í fjør. Mortan Weyhe hevur týtt báðar úr norskum. Julia og Jónas eru tólv ára gomul. Mamma Juliu er fotografur, og pápi Jónas er blaðmaður, og tey arbeiða á dagblaðnum FFF. Børnini hittu hvør annan, tá ið tey saman við foreldrunum fóru til Vietnams í arbeiðsørindum. Hesa ferð skulu foreldrini arbeiða saman og skriva um norsk ríkmannabørn á einum víngarði í Toscana í Italia. Julia og Jónas sleppa við í ein føðingardag í loyndarfulla Caiano-húsinum, har ymiskt løgið fer fram. Úlvanátt í Berardenga, sum er væl egnað til tey 8-12 ára gomlu, er 160 síður, heft og kostar kr. 120 í bókabúðunum.

# Bilar

Nr. 95 • hósdagur • 20. mai 2004 • 78. árg.

## Heidi Andreasen nýggjan Peugeot 206

**Fríggjadagin 14. mai fekk kendi gullvinnarin í svimjing, Heidi Andreasen av Eiði, ein nýggjan Peugeot 206 HDI frá P/F Meinhardt Arge. Saman við bilinum fekk hon eisini blómur frá bilasøluni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hjá P/F Meinhardt Arge bleiv meira enn vanligt gjørt burturúr seinasta fríggjadag, tá Heidi Andreasen fekk ein nýggjan Peugeot 206 HDI.

Heidi býr í Havn, nú hon gongur á Føroya Studentaskúla í Hoydølum, og svimur við Havnar Svimjifelag sjey ferðir um vikuna. Í løtuni venur hon til Paralympic leikirnar, sum verða í Athen í september.

Tá vit spurdu Heidi, hví hon hevur keypt sær ein dieselbil, sigur hon, at bilurin verður brúktur til at koyra við í skúla og til svimjing, og tá hon fer norður til Eiðis at vitja foreldrini. Hon kemur at koyra nógvar kilometrar, og ein dieselbilur í hesi støddini brennur ikki nógva olju.

Páll Danielsen, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, sigur, at Heidi hevur verið við til at seta Føroyar á heimskortið við sínum góðu úrslitum í svimjing, og hon er eitt gott umboð fyri okkara land í altjóða høpi. Vit eru fegnir um at selja henni bilin, og tað vilja vit gjarna markera.




*Páll Danielsen, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, handar her bilin, ein Peugeot 206 HDI, saman við einum blómutyssi til Heidi Andreasen*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Auto við nýggjari tænastu

**Bilstøðin Auto í Havn býður seg nú fram við einum hýruvogni til 8 ferðandi og lyftu til koyristól, sum eisini er væl egnað til barnavogn**

LYFTUBILUR

Nú ber til hjá teimum sum sita í koyristóli at ringja eftir einum hýruvogni, nær tað skal vera. Bilstøðin Auto í Havn hevur fingið ein nýggjan hýruvogn til endamálið.

Tað er Eyðbjartur Danielsen sum eigur bilin. Talan er um ein Toyota Hiace til 8 ferðandi við lyftu til koyristól ella barnavogn. Ein barnavognur kann koyrast inn í bilin uttan at takast sundur. Bilurin kann eisini brúkast til onnur endamál

Bilurin skrásettur sum hýruvognur – ikki sum minibussur.

Auto hevur nú hýruvognar til 4, 6, ella 8 ferðandi.




*Eyðbjartur Danielsen við nýggja Toyota Hiace til 8 ferðandi og lyftu til koyristól, barnavogn o.l.*

### Gongur væl hjá Honda



Tað gongur gott hjá japansku Honda verksmiðjuni. Tá roknskapurin bleiv gjørdur upp í mars, høvdu teir eitt yvirskot upp á 21,7 milliardir krónur. Hetta var ein vøkstur uppá 25,9 prosent í mun til í fjør. Honda er heimsins størsti motorsúkkluframleiðari

*Kelda: Motor Magasinet*

### Hyundai fram um Toyota



Seinasta kvalitetsrapportin frá kenda analysustovninum, J. D. Power & Associates í Kalifornia gevur Hyundai betur karakter enn Toyota. Lexus, sum aftur í ár vóru bestir, vóru ikki við í hesi rapportini

*Kelda: P/F Meinhardt Arge*

### Panda og Punto selja væl



Tað gongur betur hjá stóru italsku Fiat-bilkonsernini, undirskotið fyrsta kvartal í ár er 1,44 mill. kr. í mun til 5 mill. kr. í fjør. Orsøkin er at sølan av Fiat Punto og Panda, sum bleiv kosin ársins bilur í Evropa, hevur gingið sera væl

*Kelda: Motor Magasinet*